hinir flytifuglarnar koma, tí sum skaldið Jákup Dahl yrkir: Tú ber okkum boð um ein ljósari dag, at nú er brátt summar í hondum.

Vit frøast, tá ið fyrstu „klipp-ini" frá tjøldrunum hoyrast, tí tjaldrið og grækarissmessa er fráboðan um vár, lýkku og longri dagar.

Og tað hava vit øll tørv á, tí vetrartíðin kann tykjast drúgv og long, og tí er gott við eitt slíkt høvi at gleðast um, at tað aftur byrjar at næla og at flytifuglarnir aftur fær hug at leita heim aftur til okkara vakra land.

Tjaldrið er ímyndin um, at vit eru eitt sameint fólk, hóast vit kunnu verða ósamd um onkrar smálutir.

Ár eftir ár kemur flytifuglurin trúfastur aftur at reiðrast. Steðgar her um summarið og leitar suður aftur í heitari lond um heystið.

Hvussu ber tað til, at teir koma aftur ár eftir ár? Sjálvi halda vit, at tað man vera tí, at hann hevur tað gott her. Vit bera eisini orð fyri at vera gestablíð, og okkum dámar væl at vísa teimum vitjandi okkara vakra land.

Flyta vit hesa myndina á Tilhaldið, so haldi eg, at symbolikkurin er eyðsýndur.

Tilhaldið lat upp á grækarismessu. Øll eru hjartaliga vælkomin. Tað er bara at støkka inn á gólvið. Ongin limaskapur krevst. Øll kunnu koma og fara sum tey vilja. Nevnd og starvsfólk vilja, at øll skulu kenna seg vælkomin.

Skiftandi nevndir og starvsfólk hava við eldhuga og ágrýtni roynt at skapa eina góða samveru í Tilhaldinum.

Tað er at vóna, at tað eisini í komandi tíðum verður eins og higartil.

Herfyri vendi nýggi stjórin í Norðurlandahúsinum - Niels Halm - sær til býráðið við einum fyrispurningi, um kommunan var áhugað at vera við í einum tiltaki, kallað World Storytelling Day ella einum Altjóða frásøgudegi.

Talan er um samstarv millum Norðurlandahúsið, Tórshavnar býráð, Mentamálaráðið, Tjóðpall Føroya og Tilhaldið.

Vit hildu hetta verða eitt stak áhugavert tiltak og játtaðu alt fyri eitt at verða við, serliga tí at frásøgudagurin vendir sær bæði til skúlanæmingar og okkara eldru borgarar, pensiónistarnar. Vit síggja hetta tiltakið sum eitt kærkomið høvi at byggja brýr millum yngra og eldra ættarliðið.

Við hesum frásøgudegi, ber til at ímynda sær kvøldseturnar í gomlum døgum, sum høvdu so ómetaligan stóran týdning fyri mentanina og samleikan hjá okkum føroyingum. Her hugsi eg um skaldskap av manna munni: sagnirnar, ævintýrini og kvæðaarvin, - og hetta, at fortelja eina góða søgu. Ein frásøguháttur, sum nú á døgum kanska ikki hevur so góðar dagur.

8 søgufróð fólk fara at siga frá søgum.

Úr Skálavík kemur Palli Dalsgaard - Vilhelmina Larsen í Dali, hevur játtað at koma - og av Sandi kemur Poula Olsen - Hans Tórgarð í Kvívík - Petur Martin Petersen í Fuglafirði - Ria Tórgarð og Egi Dam í Havn og Erling Poulsen, sum flutti úr Vági til Havnar eftir at hann gavst sum lærari har suðuri, koma somuleiðis.

Hesi 8 fara óivað at fortelja onkra góða søgu.

Í Norðulandahúsinum verða 4 "frásøgupallar", t.v.s, at einir 500 næmingar og pensiónistar kunnu verða har í senn.

2 frásøgufólk eru á hvørjum palli í ein _ tíma hvør. Síðani verður ein stuttur steðgur, og nýggir áhoyrarar koma at lurta.

Frásøgudagurin í Norðurlandahúsinum verður næsta fríggjadag og byrjar kl. 9.15

Tit eru øll hjartaliga vælkomin til takið.

Men nú situr onkur kanska og hugsar, at tá vit nú hava borgarstjóran her:

Hvussu sær framtíðin á eldraøkinum út? Hvørjar ætlanir eru?

Til tað er at siga, at umframt at kommunan á røktarøkinum hevur sett nógv í verk seinasta árið, og arbeiðir við fleiri ítøkiligum ætlanum, so hava fyrireikingar verið í eina tíð at fáa sett eitt eldraráð í kommununi. Ein arbeiðsbólkur er settur, og hevur hann sín fyrsta fund mánadagin. Bólkurin er burturav mannaður við umboðum fyri tey í gásareygum "gomlu" í kommununi. Ætlanin er, at arbeiði skal verða liðugt um miðjan mai mánað.

Spennandi verður at vita, hvat fer at koma burturúr, tí í kommununi eru vit sannførd um, at við miðvísum samskifti og samstarvi við tey eldru, fara vit at náa nálum, sum í longdini fara at roynast munagóð.

Hóast tað ikki er eitt lógarkrav, halda vit tað vera rætt, at ein so stór kommuna sum okkara ger sínar royndir við slíkum ráði.

Tað er umráðandi hjá okkum politikkarum at vita, hvat veruliga ger mun í gerandisdegnum og ikki minst, at tey eldru kenna, at hóast eldri og pensjónistur, so er menniskjaliga tilfeingi eins virðismikið og neyðugt fyri heildina, sum hjá teimum yngru.

Í stuttum er talan um rættin til eitt gott lív - eisini á ellisárum.

At enda fari eg at nýta hetta høvi at takka tykkum fyri tykkara dugnaskap og arbeiðssemi.

Høvdu tit, sum í dag starvast í Tilhaldinum og øll tit mongu, ið hava tykkara dagligu gongd her, ikki lagt so stóran dent á, at Tilhaldið skal verða eitt gott stað at koma, ja so hevði ongin 7-ára føðingardagur verið í dag. Tøkk skulu tit hava fyri tað.

Eitt skulu tit vita, Býráðið er ikki bert "í dag" errið at hava eitt slíkt hús sum Tilhaldið. Nei, tað eru vit hvønn einasta dag í árinum.

Mítt ynski er, at samstarvið millum kommununa og Tilhaldið kemur at styrkjast enn meira, okkum øllum at gagni, tí virksemi, sum er her í Húsinum, er eitt stórt, týðandi sosialt og fyribyrgjandi arbeiði, sum ikki kann og ei heldur skal verða undirmett.

Hjartaliga til lukku við føðingardegnum og takk fyri!

**Heðin Mortensen**
**borgarstjóri**



*Borgarstjórin lið um lið við kendar havnarmenn*



*Í kjallaranum er eisini alt gjørt fyri at pensjónistarnir skulu hava tað so hugnaligt sum tilber*



*- Ger so væl! Alt er tilgjørt til ta hugnaligu samveruna*



*At tað er hugnaligt í Tilhaldinum man henda myndin vera besta prógvið um*